# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Olaf Krossteig deyður



24. apríl, dagin fyri flaggdagin, andaðist Olaf Krossteig í Havn, 97 ára gamal. Hann var lorvíkingur, sonur Katrinu Mariu Jacobsen og Óla Hansen, sum seinni fingu sær eftirnavnið Krossteig.

Olaf tók læraraprógv í Havn í 1929, men tá fekst einki lærarastarv, og hann fór tí at arbeiða upp á vegin, sum var í gerð millum Lorvík og Fuglafjørð. Hann var lærari í Lorvík frá hvítusunnu til ólavsøku 1930. Síðani var hann vikarur við Gjógv fyri Jóhan Kallsoy, meðan hann var í Tinginum. Eftir tað var hann eitt skifti vikarur í Kaldbak og so aftur við Gjógv. Hann var ferðalærari í Víkarbyrgi og á Akrabergi í hálvtannað ár og ferðalærari í Norðradali og Saksun stutt tíðarskeið. Síðani var hann lærari í Lopra og á Økrum frá 1933 til 1944, tá hann fór til Vágs at vera lærari í 5 ár. Síðani var hann aftur lærari í skúlanum á Leiti – fyri bygdirnar Lopra og Akrar – til hann legði frá sær fyri aldur í 1975. Í 1946-47 var hann á skeiði á Danmarks Lærerhøjskole.

Hann hevði fleiri álitisstørv. Hann var deknur á Leiti og organistur har, og hann sat í Sumbiar Bygdarráði 1942-44.

Tá Olaf fór frá sum lærari á Leiti, fluttu hann og konan til Havnar og búsettust í Vallaratúni í Eysturbýnum. Hann hevði altíð stóran áhuga fyri seyði, fiskiskapi og bjargarøkt, átti væl av jørð í Suðuroy og hevði saman við soninum 30 seyðir í haganum og 10 innistandandi. Hann ferðaðist í mong ár dúgliga suður at hoyggja og fletta.

Eisini í Havn fekst hann við seyð. Danin Poul Sørensen kom á Loranstøðina á Eggjunum í Vági. Hann giftist lorvíksgentu og flutti til Argjar, har hann hevði handil. Poul átti ein kolonihava uppi á Ternuryggi. Olaf keypti kolonihavan frá Poul og kallaði tað Stykkið. Niðan hagar fór hann við bussinum árla á morgni at síggja til teir báðar seyðirnar, hann hevði har. Á Stykkinum hevði hann tvey hús, annað til sín sjálvs, við vatni og streymi løgdum inn, og hitt til seyðirnar. Hann plagdi at keypa tvey veðurlomb frá Hanusi Vang, hava tey inni um veturin, og tá tey so vórðu dripin um heystið, plagdu tey at viga um 60 pund. Á Stykkinum hevði hann eisini hønur.

Tað var ikki av tilvild, Olaf Krossteig var lærari á Leiti. Hann fekk sær nevniliga konu úr Suðuroy, Estrid Jacobinu Midjord, dóttir Jákup og Lisu av Økrum. Børnini eru:

Maria, sum var gift við Finni Olsen í Havn, har tey búðu. Finnur doyði fyri nøkrum árum síðani.

Elsa og Jørn, sum er dani, búgva í Danmark.

Hergerð er gift við Bjørn Mohr Mortensen. Tey búgva í Havn.

Óla Jákup og Maria, sum er av Økrum, búgva í Havn.

Ása og Henning, sum er dani, búgva í Danmark.

## Neyðugt við góðum eygleiðarum

Mikudagin í næstu viku verður fundur á Viðareiði fyri ymiskum fakbólkum, har kunnast skal um verkætlanina »Børn í vanda« hjá Bláa Krossi. Við á fundinum verða leiðarar og onnur við høvuðsábyrgd av børnum í Klaksvíkar Kommunu.

Endamálið er at kunna um, hvussu ein kann gerast góður eygleiðari, og um neyðugt, hvussu síðan skal farast til verka.

Seinni verður kunnað fyri størri bólkum á teimum ymisku stovnunum og feløgunum, hvussu ein »hevur eyguni við sær«, skrivar heimasíðan hjá Klaksvíkar kommunu.

### Trygg kor

»Børn í vanda« er ein verkætlan, sum Blái Krossur í Noregi hevur arbeitt við síðani 1992. Blái Krossur í Føroyum hevur nú tillagað hesa verkætlan til føroysk viðurskifti.

»Børn í vanda« hevur sum aðalmál at upplýsa um, hvussu vit skapa trygg og góð kor hjá børnum og ungum at vaksa upp í uttan rúsevnir. Málbólkurin eru tey vaksnu, ið hava ábyrgd og tey, ið annars hava meðábyrgd av uppalingini.

Ein trýára samstarvsavtala er gjørd millum Bláa Kross Føroya og Klaksvíkar Býráð um hetta fyribyrgingarátakið.

Í tí tvørfakliga virkisbólkinum, sum Klaksvíkar Býráð hevur útnevnt, eru: Rani Nolsøe (býráðslimur), Sólrun Foldbo (skúlaheilsutænastan), Marjun Lassen (barnagarðsleiðari), Erik Biskopstø (lærari) og Eyðbjørn Jacobsen (lærari).

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt vístu samkenslu , tá elskaða kona, mamma, vermamma, omma okkara

**Sonja Veihe**
Porkeri

andaðist og varð jarðað.

Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur.
Tøkk til tykkum øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Daniel**
**Súsanna, Petur, Margreth, Óli, Dan**
**John Eli, Sonja og Djóni**

## Tvørtur um Danmark á skíðum

**Góða eydnu:** 21 ára gamli Eirik Johnsen hevur sett sær fyri at fara tvørtur um Danmark á skíðum – á hásumri!

Eirik ætlar sær ikki at brúka rulluskíðir, men vanligar skíðir og stavar, skrivar eitt norskt blað.

Sjálvur væntar hann at brúka fýra pør av skíðum, og at túrurin fer at taka tvær vikur.

– Eg komi helst at stríða meg gjøgnum urtagarðar, tvørtur um rásir og gjøgnum býir, sigur hann við blaðið.

Eydnast túrurin væl, bíðar honum enn ein stórr avbjóðing: Hann ætlar sær nevniliga at fara gjøgnum Sahara oyðimørkina á skíðum.

– Tá ætli eg mær at vera fýra mánaðir í oyðimørkini. Tað verður eitt ótrúligt høvi at fáa nýggjan mentanarligan íblástur og at kanna, hvussu eg eri fyri likamliga, sigur hann.

### Gullbrúdleyp

Í dag, 4. mai kunnu hjúnini Judy og Justinus Justinussen í Norðragøtu halda gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin á Hotel Hafnia hósdagin, Kristi himmalsferðardag, saman við familjuni.

Lesið Sosialin - so eru tit við

### 4. mai

**Dagurin eitur Florianus,** deyður umleið ár 300. Rómverskur heryvirmaður og embætismaður, sum royndi at bjarga kristnum fólki, ið vórðu forfylgd, men hann varð sjálvur tikin og fyribeindur.